# og upp á bryggjuna dagin eftir



*Sólin skein, og fólk hugnaðu sær í bátunum – og millum bátarnar*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*




*Kortið vísir, hvussu oyggir sær út, og hvat er á oynni, har eini 1000 fólk búgva*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Børn spæla við sjóvarmálan í Symbister; tey flestu eru í froskmannabúna*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Bátar og spæl

Longur uppi á bryggjuni stóðu einir 20 einsbygdir seglbátar, og hendan frálíka dagin í brennandi sól sóu vit menn flota hesar bátar og sigla úteftir vágni. Líkt er til, at hetta er ein rættiligur "sportur" í Hetlandi, sum menn ganga høgt uppí.

Børn í froskmannabúnum spældu í fjøruni, svumu og kavaðu út av brimgarðinum.

Vit kunnu taka saman um og siga, at hóast Føroyar og Hetland líkjast í veðurlagi – og partvís í skapi, so eru traditiónirnar eftir øllum at døma ikki tær somu.

Í Føroyum sigla vit ikki í smáum seglbátum, soleiðis sum teir gera í Whalsay – og tú sært sjáldan børn spæla fram við einum havnalag, soleiðis sum tú sást tey hugna sær í Symbister.

Men ivaleyst gera vit okkurt, sum tey ikki gera í Hetlandi…

Steðgurin á oynni Whalsay var avslappandi og áhugaverdur, og tú vildi ikki havt verið hesa vitjan fyri uttan, tá ið vit nakrar dagar seinni løgdu leiðina vestur aftur um hav.

Í triðja parti av frásøgnini frá hetlands-ferðini fara vit at greiða frá døgunum í Lerwick.



*Í Symbister er bátafelag, ongar brúsur, men so nógv whiskey, sum tú vilt hava*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Skiparin á Gandhi slappar av í góðveðrinum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*